# Dánial aftur á Toftum

Um vikuskiftið skrivaði B68 undir eitt ára samstarvsavtalu við 29 ára gamla Dánial Hansen, sum er glyvramaður, og sum fyri tað mesta hevur spælt í NSÍ. Dánial er fjølgávaður spælari, sum hevur spælt í miðverjuni, á høgra vongverja, á miðvøllinum og eisini í álopinum.

Dánial er ikki ókendur á Toftum, tí hann spældi við B68 fyri trimum árum síðani. Dánial spældi við Formula-liðnum hjá NSÍ fyrru hálvu í ár. Eftir summarsteðgin vandi hann millum lítið og einki, og tí spældi hann tá við næst besta liðnum hjá NSÍ.



# Jákup í HB til 2008

Ársins spælari í føroyskum fótbólti, Jákup á Borg, heldur fram í HB komandi tvey kappingarárini. Jákup hevði sáttmála við HB fram til 2007, men longu nú hava partarnir longt sáttmálan, so hann eisini fevnir um kappingarárið 2008.



## – Vit vóru bara betri

Eftir dystin fingu vit orðið á Eyðstein Elttør hjá Mjølni. Hann metti dystin vera heldur dovnan, men helt, at Mjølnir bara var betra liðið henda dagin.

– Har var ikki serliga stórur intensitetur í dystinum í dag, men eg haldi tó, at vit vóru bara betri enn Fram í dag. Síðsta vikuskiftið vunnu vit á ÍF, og í dag vinna vit á Fram, so um vit halda fram við hesum, so kann tað røkka heilt langt hjá okkum í ár. Vit eru longu í steypafinaluni, so málið hjá okkum má vera at vinna bæði steypakapping og landskapping.

## – Vit halda ikki avtalurnar

Vit fingu eisini orðið á hevaran hjá Fram, Hans Fróða Jensen. Hann var ikki nøgdur við innsatsin ímóti Mjølnir og helt, at Fram tapti fyri einum betri liðið henda dagin.

– Okkara avtalur halda ikki væl í dystinum í dag, og eg haldi, at vit taptu fyri einum betri liðið. Móttøkurnar vóru heldur ikki serliga góðar, og tá er ikki lætt hjá okkum. Eg haldi eisini, at vit brúka ov nógvar kreftir upp á dómararnar. Teir døma tað, sum teir síggja. Men tað kann tó vera strævið at fáa stig ímóti sær, sum man heldur seg eiga.

Mjølnir-Fram 3-0 (25-22, 25-18, 25-20):

# Mjølnir vann toppdystin



*Mjølnir vann tryggan 3-0 sigur í toppdystinum í meistaradeilini hjá monnum. Við sigrinum liggja teir nú einsamallir á odda*

*Mynd: Álvur*

**Mjølnir vann tryggan sigur í toppdystinum í meistaradeildini hjá monnum ímóti Fram. Við sigrinum hevur Mjølnir lagt seg einsamalt á odda, meðan Fram missir týðandi fet í oddatríðnum**

MANSFLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Gongdin hjá bæði Mjølnir og Fram hevur verið sera góð síðstu dystirnar. Mjølnir hevði undan dystinum vunnið tríggjar dystir á rað, og seinasta dyst vunnu teir 3-0 ímóti ÍF, sum hevði vunnið allar sínar dystir undan hesum dystinum. Hjá Fram hevur eisini gingist væl. Teir hava vunnið seinastu tveir dystirnar, men seinast teir taptu, var tað júst fyri Mjølni, so kanska klaksvíkingarnir vóru lítlir favorittar undan toppdystinum á heimavølli.

### Javnt fyrsta sett

Men sjálvt um Mjølnir kanska var lítil favorittur, so fekk Fram tó betri byrjan upp á dystin. Teir løgdu hart út, og Mjølnir hevði sera stórar trupulleikar at sleppa fram við blokkinum hjá Fram fyrsta løtuna. Fram megnaði eisini at vinna seg fram um, og tíðliga í settinum førdu teir 6-10. Løtu seinni høvdu teir vunnið seg upp á 8-13, og teir tóktust hava gott tamarhald á leikarunum hjá Mjølni. Men so steðgaði upp.

Mjølnir fekk glið á sítt spæl, og næstu næstu løtuna vann Mjølnir seks bóltar, meðan Fram bert vann ein, og so stóð knappliga á jøvnum 14-14. Eftir hetta var Mjølnir oman á, og teir vunnu seg skjótt fram um Fram, sum tó royndi at hanga í. Mjølnir megnaði tó at vinna fyrsta settið, og úrlitið gjørdist 25-22 til heimaliðið.

### Mjølnir helt fast

Í øðrum setti legði Mjølnir hart út. Teir spældu gott og skjótt álopsspæl, og oftast megnaðu teir at sleppa fram við sterka blokkinum hjá Fram fyrstu løtuna. Tíðliga í settinum vann Mjølnir seg fram um 10-6, og hesa leiðsluna hevði Fram ringt við at vinna inn aftur. Í staðin fyri at spæla flogbólt, so valdu leikararnir hjá Fram í nógvum førum at grenja inn á dómaran, og hetta gjørdi, at konsentratiónin sveik í mongum førum. Mjølnir dugdi eisini væl at gera sær dælt av hesum. Og løtu seinni høvdu teir vunni ðseg fram um 19-14. Nú var settið í roynd og veru avgjørt, og Mjølnir vann eisini hetta settið 25-18.

### Kjaftaslit kostaði

Í triðja setti var tó líkt til, at Fram hevði sæð veruleikan í eyguni. Teir byrjaðu væl og megnaðu beinanvegin at leggja seg á odda 1-4. Hesa løtuna hevði Mjølnir stórar trupulleikar við blokkinum. Men so við og við megnaði Mjølnir at fáa gongd á aftur spælið, og løtu seinni stóð á jøvnum 8-8. Nú hevði Mjølnir fingið glið á aftur spælið, og ikki gekk long tíð, áðrenn klaksvíkingarnir aftur vóru á odda. Nakrar bóltar seinni var støðan knappliga 14-11 til Mjølnir, og nú sá ikki gott út hjá Fram. Teir royndu tó at berja seg innaftur í dystin, men Mjølnir vóru snøgt sagt betri henda dagin. Teir øktu enn meir um leiðsluna upp í 20-15, og so var líðugt fyri Fram. Mjølnir vann eisini triðja settið. Úrslitið gjørdist 25-20, og sostatt vann Mjølnir toppdystin í bestu mansdeildini, og við sigrinum hava teir nú lagt seg einsamallar á odda.

Tað var tó ikki so løgi, at Mjølnir vann henda dystin. Fram brúkti alt ov nógvir kreftir at gremja seg um dómaran, og í longdina var tað helst hetta grenjið, sum kostaði teimum sigurin. Kanska gjørdu dómararnir ávísar feilir, men feilirnir vóru tó ikki so nógvir í tali, at leikararnir hjá Fram høvdu grund til at gremja seg á ein slíkan hátt, sum talan var um í Klaksvík leygardagin.